# Føroyar kunnu ikki útflyta rogn

**ALING** Sum er, kunnu føroysk laksarogn ikki seljast til ES og onnur lond, tí tað er eingin føroyskur myndugleiki sum sigur, at framleiðslan lýkur tey krøv, sum umheimurin setir

Vilmund Jacobsen

Nú Fiskaaling og stóra norska kynbótafelagið SalmoBreed eru farin undir samarbeiði um at veita føroyskum alarum laksarogn, sær Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling, fyri sær, at Føroyar eisini kunnu gerast ein útflytari av laksarognum.

Men hetta letur seg ikki gera sum er. Tað er nevniliga eingin myndugleiki í Føroyum sum sigur, at rognini eru í lagi. Hetta merkir tó ikki, at fiskur og rogn eru sjúk, men fyri at sleppa gjøgnum nálareygað hjá eitt nú ES er neyðugt at skjalprógva, at rognini ikki eru fongd við sjúku.

Stjórin í SalmoBreed, OddGeir Oddsen, heldur, at avtalan millum partarnar eisini er týdningarmikil fyri norska kynbótafelagið.

– Vit vilja viðvirka til, at Fiskaaling, sum í dag hevur eini 50-75% av føroyska marknaðinum, sum frá líður fer at gerast enn sterkari á marknaðinum, sigur hann.

### Heimaarbeiði

Kristian Petersen sigur, at skulu Føroyar kunna gerast útflytari av laksarognum, skal eitt arbeiði gerast her heima í Føroyum, soleiðis at vit kunnu skjalprógva yvirfyri ES og øðrum, at okkara framleiðsla lýkur tey krøv, sum londini seta.

– Tá einki skjalprógv er, hava vit heldur ikki klassapappírini í lagi – um vit kunnu siga so, leggur hann aftrat.

Hvussu ein skipan kann fáast í lag við, at føroysk rogn fáa síni skjalprógv, er nakað, sum politiski myndugleikin og landsdjóralæknin mugu finna út av.

– Eg kundi hugsað mær, at tað í hesum føri er vinnumálaráðið, sum heitir á landsdjóralæknan um at seta hol á hetta arbeiði, sigur Kristian Petersen.

Fara vit góð 10 ár aftur í tíðina, hava Føroyar áður útflutt rogn til Chili, men hetta læt seg gera, tí krøvini, sum Chili tá setti fyri at keypa hesi rogn, ikki hava verið serliga strong.

vilmund@sosialurin.fo

**... tá einki skjalprógv er, hava vit heldur ikki klassapappírini í lagi...**
KRISTIAN PETERSEN



*Skulu laksarogn úr Føroyum fáa skjalprógv sum verandi uttan smittuvanda, noyðist vinnumálaráðið helst at heita á landsdjóralæknan um at seta hol á hetta arbeiði*

– Vit síggja stórar møguleikar í hesum samstarvi, sum upp á longri sikt eisini kann koma at geva inntøkur við sølu.

Stjórin sigur, at í fyrstu syfti er hann nøgdur, um framleiðslan av rognum til føroyskar alarar kann fáast at hvíla í sær sjálvari. Hinvegin kunnu inntøkur skapast við sølu til føroysku alivinnuna, um vinnan tekur dyggiliga undir við kynbótasamstarvinum millum Fiskaaling og SalmoBreed.

– Tað er í fyrsta lagi føroyska alivinnan, sum er í okkara huga, men vit hugsa eisini um at selja rogn av landinum til útlendskar laksaframleiðarar, og tá kann talan gerast um eina veruliga forrætning, sigur hann.

### Betri enn vit

Kristian Petersen leggur aftrat, at meðan samstarvið millum føroyska og norska felagið er í gongd og verður bygt upp, fer Fiskaaling sum higartil at selja rogn undan føroyskum lívfiski til føroysku alararnar.

– Føroysku rognini undan lívfiskinum, sum nú gongur í Skopun, verða burtur, tá rognini, sum spyrjast úr samstarvinum millum Fiskaaling og SalmoBreed, taka yvir. Føroyskir alarar hava verið fegnir um føroysku rognini, men tá kynbótaarbeiði longu er hildið uppat fyri nøkrum árum síðan, ber í longdini ikki til at byggja føroyska laksaaling á henda lívfisk.

Kristian Petersen vísir á, at tað hendir nógv á hesum øki, og hevði Fiskaaling ikki fingið samstarvið við SalmoBreed í lag, høvdu onnur kynbótafeløg við árunum gjørt tað nógv betri enn føroyingar.

Stjórin í Fiskaaling fegnast eisini um, at endalig greiða nú er fingin á, hvør framtíðin hjá Lívfiskastøðini í Skopun verður.

### Hittust í Brüssel

Tað var annars á matvørumessuni í Brüssel fyrr í ár, at Fiskaaling kom í samband við SalmoBreed, og longu nú í heyst er samarbeiðsavtala fingin í lag millum partarnar, sum fer at veita føroyskum alarum rogn um eini trý ár.

vilmund@sosialurin.fo



*Føroyska laksafamiljan hjá Fiskaaling verður ikki heilt útruddað, sum árini ganga, tí felagið fer at lata sil undan hesum laksi niðurfrysta*

# Sil niðurfrystast og varðveitast

**LAKSAFAMILJA** Hóast føroyski lívfiskurin verður avtikin, tá rognini, sum Fiskaaling og SalmoBreed fara at framleiða í felag, koma á marknaðin, fer Fiskaaling kortini at lata niðurfrysta sil undan føroysku laksafamiljuni

Vilmund Jacobsen

Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling, sigur, at í staðin fyri púrasta at avtaka føroysku laksafamiljuna, tá nýggju rognini koma á marknaðin um eini trý ár, at sil undan føroyska hannfiskinum skulu niðurfrystast og goymast, tá føroyska laksafamiljan annars verður niðurlagað og avtikin.

– Føroyar hava brúkt nógvan pening upp á lívfisk gjøgnum árini, men í 2005 helt hetta arbeiði uppat. Í staðin fyri bara at avtaka allan hendan fiskin, hava vit gjørt avtalu við SalmoBreed, at sil undan føroyska hann-fiskinum verða niðurfryst hjá teimum.

Kristian Petersen sigur, at norðmenn hava serfrøði til slíka niðurfrysting, og tí hevur Fiskaaling valt at goyma silini í Noregi.

– Tað ber ikki til at goyma rogn, og soleiðis eru silini tað einasta, sum kann goymast, so hesin parturin av føroysku laksafamiljuni kann varðveitast á tryggari goymslu.

Stjórin í Fiskaaling dylur ikki fyri, at føroyska alivinnan hevur verið fegin um føroyska lívfiskin, men við tað, at einki aktivt kynbótaarbeiði verður gjørt úr hesum fiski longur, er neyðugt at skifta føroysku familjuna út.

– Føroyska alivinnan brúkar eini 20 miljónir rogn um árið, og okkara partur av hesum hevur ligið um einar 12 miljónir rogn, sigur Kristian Petersen.

vilmund@sosialurin.fo

**... tað ber ikki til at goyma rogn, og soleiðis eru silini tað einasta, sum kann goymast...**
KRISTIAN PETERSEN